| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 30. mai 2013 |
| Býráðsfundur nr. | 04/2013 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2013 tann 30. mai kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 24. mai 2013 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Atli Larsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

Atli Larsen møtti á fundinum sum varalimur fyri Sigurð S. Simonsen, sum boðað hevði frá forfalli til fundin.

Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari luttók á fundinum, meðan mál nr. 24/2013 og 25/2013 vórðu til viðgerðar og avgerðir tikinar.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 24/2013.**

**Mál viðvíkjandi roknskapi kommununar fyri 2012.**

Fuglafjarðar kommuna hevur tann 22. mai 2013 móttikið grannskoðaðan roknskap fyri kommununa saman við grannskoðarafrágreiðing fyri 2012 frá Januar – løggilt grannskoðaravirki, undirskrivaður av Fróða Sivertsen, statsaut. revisor og annars grannskoðaður av Snorra á Bøgarði, skrásettum grannskoðara.

Fíggjarnevndin hevur á fundi tann 23. mai 2013 gjøgnumgingið roknskapin og grannskoðarafrágreiðingina saman við fíggjarleiðaranum Marini Thomsen og Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara og samanhildið roknskaparøkini saman við fíggjarætlan kommununar fyri 2012.

4 eykajáttanir eru framdar av býráðnum í árinum, og eru tær til dagstovnin Stropan, ÍF flogbólt, sløkkiliðið og Fuglafjarðar havnl upp á tilsamans kr. 3.270.000,00, sum fíggjaðar eru so at siga allar av innistanandi peningi og meirinntøkum. Hesar eru kunngjørdar Fíggjarmálaráðnum við skrivum, dagfestum 01. juni, 30. november og 17. desember 2012.

Roknskapurin vísir eitt rakstrarhall áðrenn avdráttir og lántøku upp á kr. 300.143,00 móti einum rakstraravlopi á kr. 4.435.952,00 í 2011.
Sambært høvuðsyvirliti í roknskapinum eru útgreiningarnar hesar og samanhildnar í mun til góðkendu fíggjarætlanina við framdum eykajáttanum í árinum:

| | Kontoheiti: | Roknskapur: | Fíggjarætlan | Munur +/- |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Kommunal fyrisiting | -8.315,443,00 | -7 976.700,00 | 338.743,00 |
| 2 | Almanna- og heilsumál | -4.233.062,00 | -4.432.000,00 | -198.938,00 |
| 3 | Børn og ung | -9.113.444,00 | - 9.873.000,00 | -759.556,00 |
| 4 | Undirvísing | -3.648.404,00 | -2.984.000,00 | 664.404,00 |
| 5 | Mentan og frítíð | -5.079.283,00 | -4.368.500,00 | 710.783,00 |
| 6 | Teknisk mál | -5.565.001,00 | -4.446.000,00 | 1.119.001,00 |
| 7 | Kommunal virki | -.1.407.048,00 | -851.000,00 | 556.048,00 |
| 1-7 | **Økið 1-7 tilsamans** | **-37.361.684,00** | **-34.931.200,00** | **2.430.484,00** |
| 20 | Rentukostnaður-netto | -3.375.093,00 | -3.970.000,00 | -594.907,00 |
| | **Økið 1-7 tilsamans** | **-40.736.777,00** | **-38.901.200,00** | **1.835.577,00** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1-7 | NettoiÍløgur 1-7 | -11.518.986,00 | -17.687.000,00 | -6.168.014,00 |
| | **Samanteljing** | **-52.255.763,00** | **-56.588.200,00** | **4.332.437,00** |
| 25 | Avdráttir av lánum /fíggjarbroytingar | 3.186.321,00 | 4.570.000,,00 | -5.213.679,00 |
| | **Samanteljing** | **-49.069.411,00** | **-52.018.200,00** | **-1.383.679,00** |
| 20 | Skattainntøkur | -45.446.327,00 | 44.887.880,00 | -558.447,00 |
| | Lántøka | - 5.472.326,00 | 6.500.000,00 | 1.027.674,00 |
| | Kapitaleftirlønir vm. | -1.036.937,00 | 631.000,00 | -405.937,00 |
| | Samantals: | -51.955.590,00 | 52.018.880,00 | -63.290,00 |
| | **Gjaldførisúrslit** | **-2.886.179,00** | **680,00** | **-2.885.499,00** |

Annars eru íløgurnar útgreinaðar á blað síðu 7 í grannskoðaða roknskapinum.

Býráðið hevur annars samtykt eykafíggjarjáttan fyri tilsamans kr. 3.270.000,000 í árinum, og er henda, sum nevnt frammanfyri, fráboðað Fíggjarmálaráðnum, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin).

*Býráðið/fíggjarnevndin er somuleiðis skrivliga kunnað um av fyrisitingini, at ein eykajáttan í flestu førum førir eina útreiðslu við sær, sum beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2012. Eykajáttanin er víst niðanfyri.*

| **Øki** | **Framd eykajáttan:** | | **Upphædd:** | **Fígging:** | | **Endamál:** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | 01. juni 2012 | | 2.100.000,00 | Innist. peningur | | Dagstovnurin Stropin |
| 4 | 29. november 2012 | | 70.000,00 | Innist. peningur | | ÍF flogbóltur |
| 7 | 29. november 2012 | | 100.000,00 | Innist. peningur | | Sløkkiliðið |
| 5 | 13. desember 2012 | | 1.000.00000 | Fuglafj. havn | | MEIRINNT/INNIST. |
| | **Tilsamans** | | **3.270.000,00** | | | |

Lántøka er framd í 2012 upp á kr. 4,0 mió.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. mai 2013 og mælir nevndin einmæld býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskap kommununar fyri 2012 uttan viðmerkingar. Grannskoðarafrágreiðingin verður send býráðslimum í trúnaði saman við málinum.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og góðkenna roknskap kommununar fyri 2012 uttan viðmerkingar. (9-0).

**<u>Mál nr. 25/2013.</u>**

**Umsókn frá Havsbrún um víðkan av fóðurgoymsluni.**

Í samband við notat frá fundi 10. mai 2013 millum Havsbrún og Fuglafjarðar kommunu viðvíkjandi planering fyri Fóðurgoymslu III sum er mett at kosta umleið kr. 15 millionur, hevur býráðið í fíggjarætlanini fyri 2013 avsett kr. 10,5 millionir til planeringsarbeið og 3,0 mió. kr. til yvirtøku av Fóðurkejini.

Vinnunevndin er samd um, at ein loysn har Havsbrún og Bergfrost fíggja 4,5 milliónir við eini famtíðarleigu, undir ongum umstøður kann verða gingin á møti.

Í 2002 varð støðan tann, at í sambandi við munandi útbyggingar av havnalagnum varð neyðugt, at Havsbrún ikki skuldi steðga upp við útbygging av fóðurframleiðsluni.

Tá ið Føroya landsstýri gjørdi alt tað teir kundu fyri at steðga hesi útbygging, var avtalað gjørd millum Fuglafjarðar kommunu og Havsbrún um, at Havsbrún í fyrstu syftu skuldi gjalda og fíggja hesa útbygging, sum kom at kostað umleið kr. 8,0 milliónir, og varð sáttmáli gjørdur partana millum hesum viðvíkjandi.

Hesin sáttmáli er grundaður á, at hendan íløga skal verða útreiðsluneutral, soleiðis at skilja, at tá ið Havsbrún hevði fingi útreiðslurnar arturgoldnar í spardum vørugjaldi, skuldi kommunan hava møguleika at yvirtaka ognina. Hetta framgongur eisini av skrivi frá Havsbrún dagf. 19.februar 2002 seinasiti setningur í fyrsta reglubroti sum er soljóðandi " *Partarni eru samdir um, at tá avtalan gongur út, skal Havsbrún hava fingi sínar kapitalútreiðslur (avdrøg og rentur) afturgoldnar"* .

Útrokningar vóru tá gjørdar, um mettan vøruflutnin og mettan íløgukostnað, og hvat tíðarskeið varð hóskani til eina íløgu, sum vit tá mettu umleið 12 milliónir. Út frá hesum metingum varð hildið, at eitt tíðarsekið uppá 15 ár varð hóskandi og sáttmáli gjørdur við hesum sum grundarlagi.

Vísandi til at tey seinasti 4 árini hevur vørugjaldið yvir Fóðurbryggjuna verið 17,0 milliónir krónur, so samanlagt síðan 2002 hevur Havsbrún spart eitt stað millum 25 og 30 milliónir í vørugjaldi fyri eina íløgu uppá umleið 8. milliónir.

Tá ið Havsbrún nú hevur realistiaskar umsóknir sum krevja, at Fuglafjarðar kommuna skal gera íløgur fyri kr. 17,1 mió her og nú, og uppá sikt fram til 2022 uppá fleiri 10 tals milliónir, er neyðut at inntøkugrundarlagið fyri Fuglafjarðar havn eisini er partur av hesi viðgerð. Tí er neyðuga at Fuglafjarðar kommuna og Havsbrún síggja tann positiva veruleikan í eyguni og handla eftir ti, soleiðis at allir partar kunnu komað víðari.

Vísandi til at Havsbrún fyri langari tí síðani hevur fingi íløguna í Fóðurbryggjuna aftur fleiri ferðir, hava teir fyri langari tíð síðani fingið tað fíggjarliga aftur, sum er grundarlag fyri sáttmálanum.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 22. mai 2013 og er er samd um, at fyritreytin fyri at kunna gera planeringsarbeið undir Fóðurgoymslu III er, at kommunan yvirtekur "Fóðurbryggjuna". Mælt verður tí til at samráðingar við Havsbrún halda fram við tí sum endamáli, at kommunan yvirtekur Fóðurbryggjuna.

Eisini skal verða havt í huga, at í samband við hetta planeringsarbeiði, skal Fóðurbryggjan leingjast við umleið 40 metrum, og er tað tá neyðugt, at sami eigari er av hesi bryggju.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. mai 2013 og mælir ein meiriluti Sonni á Horni og Magnus S. Midjord býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá Vinnunevndini frá 22. mai 2013.

Ein minniluti Árant berjastein mælir býráðnum til ikki at gera útbyggingina av fóðurdeildini við grótfylling, men at P/F Havsbrún fær loyvi at útbyggja fóðurgoymsluna suðureftir, tó soleiðis at henda ikki kenur at tarna virkseminum hjá P/F Bergfrost.

Hann er av teirri áskoðan, at kommunan í hesum sambandi kann spara kr. 10,5 mió., og sostatt hevur møguleika fyri at nýta henda pening til aðrar neyðugar kommunalar íløgur, sum koma at gagna borgarunum.

Á fundinum fekk nevndin hagtøl frá Fuglafjarðar havn, dagfestum 23. mai 2013, staðfest, at samlaða vørugjaldið yvir fóðurbryggjuna frá 2002-2012 hevur verið kr. 31.886.578,42. Samlaða vørugjaldið fyri 2012 yvir fóðurbryggjuna hevur verið kr. 3.926.599,66.

Sosattt hevur P/F Havsbrún havt ein fíggjarligan vinning av sáttmálanum partanna millum fyri fóðurbryggjuna til og við 2012: kr. 31.886.578,42 – kr. 8.000.000,00 = kr. 22.886.578,42. Um so verður, at sáttmálin partanna millum heldur fram til 2017, so verður samlaða vørugjaldið mett til umleið kr. 45,0 mió, og kemur Havsbrún sostatt at hava ein vinning upp á umleið kr. 37,0 mió.

Omanfyri nevndu fíggjarligu viðurskifti eru annars neyvan í tráð til skriv frá P/F Havsbrún til kommununa, dagfest 19. februar 2002, har millum annað stendur:
"Partarnir eru samdir um, at tá ið avtalan gongur út, skal Havsbrún hava fingið sínar kapitalúreiðslur (rentur + avdrøg) afturgoldnar.

**Avgerð:**
Atkvøtt varð fyrst um minnilutauppskotið frá Árant Berjastein. Uppskotið fall. (1 stkv. fyri, 5. atkv. ím+ori og 2 atkv. blankar). Ímóti atkvøddu: Sonni á Horni, Magnus S. Midjord, Dánjal Vang, Birgir Petersen, og Eyðun á Lakjuni. Blankt atkvøddu Sigga Óladóttir Joensen og Petur Abrahamsen.

Síðan varð atkvøtt um meirilutauppskotið. Hetta varð samtykt. (7-1. Ímóti atkvøddi Árant Berjastein).

*Eyðun á Lakjuni vildi hava eina viðmerking føda í gerðabókina um, at samráðingartilgongdin við Havsbrún verður sett í gongd beinanvegin.*

Meðan málið varð viðgjørt og avgerð tikin varð Atli Larsen ikki á fundi vegna ógjegni, hetta í sambandi við svágd við stjóran á Havsbrún. Í hesum sambandi verður víst til upprit frá Bárði Larsen, løgfrøðingi hjá Kommunusamskipan Føroya, dagfest 30. mai 2013 um viðurskiftini. Somuleiðis fór býráðsskrivarin av fundinum, við tað at hann somuleiðis eisini metti seg verða ógjegingan av somu orsøk.

**<u>Mál nr. 26/2013.</u>**

**Mál viðvíkjandi reglum fyri útleigan av Mentanarhúsinum.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið uppskot frá Ólavi Larsen, leiðara fyri Mentanarhúsinum, dagfest 30. januar 2013 við uppskoti til takstir fyri útleigan/útláni av húsinum og uppskot til leigusáttmála um leigu.

Í hesum sambandi verður víst til § 6, stk. 4 í reglugerðini fyri Mentanarhúsið, sum sigur, at tað er leiðarin, sum skal gera uppskot um prísir og almennar reglur fyri útleigan av hølum vm., og leggja uppskotið fyri mentamálanevndina.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. februar 2013 og mælir býráðnum til at góðkenna uppskotið til leigusáttmála, meðan nevndin ynskir at kanna leiguinntøkurnar av rakstri, um leiðarin kemur at ráða yvir hesum inntøkum, sum eru oman fyri tað upphædd, sum avsett er á fíggjarætlan kommununar fyri 2013.

Somuleiðis ynskti nevndin at fáa kanna, um separatur leigusáttmáli ikki eisini eigur at verða gjørdur fyri útleigan av køkinum.

*Avgerð á býráðsfundi 28. februar 2013:*
Samtykt at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála, hetta sambært tilmælinum frá mentamálanevdini. (9-0). Samtykt varð at beina málið um leigutakstir fyri Mentanarhúsið, hetta vísandi til §6, stk. 4 í reglugerðini fyri húsið, aftur í mentamálanevndina til endurskoðan, og verður tilmæli sent býráðnum aftur til endaliga støðutakan. (9-0).

Vísandi til samtykt býráðsins frá 28. februar 2013, so hevur mentamálanevndin viðgjørt spurningin av nýggjum á fundi 13. mars 2013 um leigutakstir fyri Mentanarhúsið, hetta við atliti til umrøðuna og viðmerkingarnar frá býráðslimum á fundinum 28. februar há.

Talan varð um, at samsvar ikki varð ímillum fermetur leiguna fríggjadag til sunnudag í sambandi við tiltøk, eitt nú fyri ovara og niðara sal. Sambært uppskotinum verður leigan heilan dag av niðara sali ásett til kr. 6.000,00 heilan dag, meðan leigan fyri ovara sal er ásett til kr. 5.000,00.

Somuleiðis er sera lítil prísmunur at leiga alt Mentanarhúsið (kr. 7.500,00 privat) heilan dag og stóru salarnar. Somuleiðis eru onnur viðurskifti, sum nevndin metir skulu upp aftur at venda, áðrenn tilmæli aftur verður latið býráðnum eitt nú:

- At takstirnir møguliga eru ov høgir til at leiga húsið ella partar av hesum generellt.
- At gjørt verður eitt uppskot um leigutakstir hjá áhugafeløgum og bólkum í Fuglafjarðar kommunu, har reingerðin er íroknað.
- At gjørt verður uppskot um leiguviðurskifti (møguliga ókeypis ella rímiliga leigupris) í sambandi við eitt nú brúdleyp, ervi, barnadópi, hátíðardagar sum viðvíkjan borgarum í kommununi vm.

Nevndin samtykti á fundi tann 13. mars 2013 at heita á leiðaran fyri Mentanarhúsinum at gera nýggj uppskot til leiguprísir fyri útleigu av húsinum við atliti til viðgerðina, sum nevnd er omanfyri, og at lata nevndini hetta til nevndarviðgerðina fyrst í apríl 2013, soleiðis at nevndin kann lata býráðnum sítt tilmæli til fundin tann 18. apríl h.á.

Kommunan hevur móttikið teldupost frá leiðaranum fyri Mentanarhúsið tann 17. apríl 2013 við uppskotum um broyttar takstir fyri leigu og húsinum, men við tað at uppskotið tykist eitt sindur misvísandi, so hevur fyrisitingin aftur heitt á hann um at gera eitt nýtt uppskot við eitt nú atliti til avgerðina á býráðsfundinum tann 28. februar 2013 og greitt at taka kommunalu stovnarnar við í eini takstskipan.

Mentamálanevndin hevur tann 14. mai 2013 við telduposti móttikið nýtt uppskot um takstir, og er hetta víðarisent nevndarlimunum og borgarstjóra í sambandi við viðgerðina á nevndarfundinum ídag.

Nevndin viðgjørdi málið á fundi 14. mai 2013 og varð samd um at tosa við Ólav Larsen, leiðara fyri Mentanarhúsið aftur, og at taka málið uppaftur til viðgerðar á eykafundinum 15. mai 2013.

Nevndin hevur móttikið nýggj uppskot frá leiðaranum tann 15. mai 2013 til takstir og treytir fyri leigu av Mentanarhúsinum til:

1. Áhugabólkar og feløg í Fuglafjarðar kommunu.
2. Leigu av Mentanarhúsinum annars.

Mentamálanevndin viðgjørdi málið aftur á eykafundi tann 15. mai 2013, og mælir nevndin einmælt býráðnum til at góðkenna uppskotini frá leiðaranum við teimum viðmerkingum og treytum, sum lýstar eru. Takstirnir verða galdandi fyri tíðarskeiðið 01. januar til 31. desember 2013.

Annars mælir nevndin broyting á ad 1., at leigutakstirnir eisini koma at umfata kommunalar stovnar, sum annars ikki eru nevndir í uppskotinum, og at nevndin tekur málið um ásetan av nýggjum takstum eftir 01. januar 2014 upp aftur til viðgerðar fyrst í komandi ári.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0).

**Mál nr. 27/2013.**

**Umsókn frá Einari Petersen um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211g á Bjarnarvegi 32 í Fuglafirði.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Einari Petersen, dagfest 08. mai 2013 um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 211g á Bjarnarvegi 32 í Fuglafirði sambært hjáløgdum tekningum.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 13. Mai 2013 og mælir nevndin býráðnum til, at umsóknin verður gingin á møti soleiðis at:

1. Treytirnar í almennu byggisamtyktini fyri Fuglafjørð og kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verða fylgdar.
2. Í hesum sambandi verður víst á, at øll búrúm skulu hava minst eitt vindeyga, sum kann latast upp við fríum opi, sum er minst 50 cm í breidd og 60cm høgt. Hædd + breidd á tí fría opinum skal vera minst 1,50 m2.
3. Parkeringpláss til 2 bilar skal verða inni á stykkinum, og hetta skal verða gjørt áðrenn flutt verður inn í húsini. Møguligt bilhús verður ikki roknað sum bilstøðil.
4. Ø 315 mm reinsibrunnur skal verða settur á báðar kloakkleiðingarnar áðrenn hesir verða veittir út av grundstykkinum.
5. Rottangi skal verða samb. leiðbeining frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og settur niður samb. vegleiðing um rottangauppseting. Eisini skal rundskriv dagf. 2. juli 1998 frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni viðv. nýtslu av tilfari til dren verða fylgd.
6. Kloakkplanur skal góðkennast av teknisku deild og kloakkirnar skulu sýnast og góðkennast av teknisku Deild, áðrenn tær verða tyrvdar.
7. Húsini skulu verða sett av teknisku deild.

Byggiloyvi er galdandi í 2 ár frá útskivingardegnum.

**Avgerð:**
Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (8-0). Meðan málið varð viðgjørt var Petur Abrahamsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**Mál nr. 28/2013.**

**Viðvíkjandi avgreiðslu av byggimálum.**

Tekniska nevndin mælir á fundi tann 14. mars 2013 býráðnum til, at byggimál til sethús, sum eru innan fyri allar ásetringar í lógum og kunngerðum, kunnu verða avgreidd av teknisku deild, sum so kunnar teknisku nevndina um avgreidd mál.

Mál, sum eru umfatað av frávikum ella eru ivasom, verða løgd fyri teknisku nevndina og býráðið.

**Avgerð:**
Samtykt varð at beina málið aftur í teknisku nevndina til víðari viðgerðar. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.35.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Atli Larsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen